Um havørnina

Havørnin eitur á latíni *Haliaetus albicilla*

Framgongdin hjá størsta fugli í Norðureuropa, havørnini, er ein eydnusøga, ið vísir, at holl verja kann bjarga einum slagi undan oyðing.

Fyri umleið 200 árum síðan átti havørnin næstan um alt Vesturevropa, men í endanum á 19. øld hevði hon verið so nógv jagstrað, at hon var mest sum oydd. Miðskeiðis í 20. øld var tað, ið eftir var, eisini hótt av umhvørviseitri.

Havørnin livir serliga av fiski, fugli og smásúgdjórum. Hon tekur ikki seyð, men etur ræ. Í Føroyum eigur slagið ikki, men hon átti fyrr og varð eftirtráað langt aftur í 1600-árini. Havørn verpur 1-2 egg og summi ár 3.

Norski havarnarstovnurin er tann størsti í Evropa, og Norra hevur sostatt ábyrgd av øllum tí evropeiska stovninum. Pisur úr Norra eru fluttar út til Skotlands og Írlands, har heimastovnurin var útdeyður.

Kanska kundu vit eisini gjørt hetta í Føroyum, ella hvat halda tit?

Hvat man fjala seg í prikkunum? Tekna striku millum talmerktu prikkarnar og síggj!